LYDIA DIDRIKSEN
Mia og Lias
Myndir: Solveig Hansen

Hattur

Selar



Mia og Lias leita og leita.
Tey eru inni.

„Eg sá ein hatt við nál,“
sigur Mia.
„Í eini skál?“ flennir Lias.
„Nei, ein hatt við nál!“
flennir Mia.

„Ein revur,“ rópar Mia.
„Ein revur?“ sigur Lias.
„Ja, ein fínur revur!“ sigur Mia.

„Eg fann gular selar," sigur Lias.
„Gular pelar?" flennir Mia.
„Nei, gular selar!" flennir Lias.

„Eitt ur," rópar Lias.
„Eitt ur?" sigur Mia.
„Eg fann eitt ur!" sigur Lias.

„Eg eri ein abbi," sigur Lias.
„Ein krabbi?" flennir Mia.
„Nei, nei, ein abbi!" flennir Lias.

„Eg eri ein dama í hatti,"
sigur Mia.
„Í vatti?" flennir Lias.
„Nei, nei, Lias, eg sigi í hatti."

„Kom ein túr út!“ rópar Mia.

So fara tey út.

Ein fín dama í einum revi
og hatti við nál.

Og ein abbi í gulum selum
og við einum uri.